## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:** Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og regn av og á. Hitin milum 5 og 8 stig. Seinnapartin snarar hann í útnyrðing og veksur vindin upp í hvassan vind og ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:** Fyrrapartin lot av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og møguliga regn eitt skifti. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:** Fyrrapartin strúkur í vindi av suðri og regn, seinnapartin kemur hann av vestri við somu vindferð og ælingur, Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:** Hann minkar vindin niður í andøvsgul av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt, men sunnudagin veksur hann vindin aftur upp í hvassan vind av útsynningi og møguliga regn. Hitin millum 4 og 8 stig.

# The Dreams fekk 3. pláss í donskum GBOB



**Tað eydnaðist ikki The Dreams at sleppa til London at kappast ímóti Deja Vu í altjóða GBOB kappingini.**

**TÓNLEIKUR**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Danska útgávan av The Global Battle Of The Bands varð hildin í spælistaðnum Lille Vega í gjárkvøldið, uttan at The Dreams megnaði at vinna seg í heimsfinaluna í London, men føroyski bólkurin fekk triðja plássið.

Vit fingu orð á Hans Edvard sangara og gittarleikara í The Dreams beint eftir, at úrslitið var almannakunngjørt. Hann greiddi frá, at teir vóru nøgdir við úrslitið, sum var heilt ok.

- Vit spældu av H. til í kvøld, og har vóru tveir bólkar, sum vóru betur enn vit, segði hann.

- Bólkurin sum varð nummar eitt var ordiliga feitur, stílurin minti eitt sindur um Deja Vu, bara betur greiddi Hans Edvard frá. Hann segði somuleiðis, at nú høvdu fólk sæð The Dreams, og vónandi kundi hetta vera við til at skaffa spælingar aðrastaðni.

Annars var Hans Edvard ikki heilt nøgdur við ljóðið á kvøldinum.

- Eg havi ongantíð upplivað so vánaligt ljóð. Alt kvøldið var tað ordilig skrapa, tú skuldi trúð, at ljóðmenninir ongantíð høvdu sæð ein ljóðpult fyrr.

Tað hevur ikki verið møguligt hjá okkum, at finna nøvnini á teimum báðum fremstu bólkunum.

Wandering Sins við føroyska oddamanninum Magnusi Mortensen á gittar og sangi var ikki millum teir tríggjar fremstu bólkarnar í kappingini, og tí vita vit ikki hvar hesin bólkurin endaði í raðfylgjuni.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | -- |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 8 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | -1 |
| Moskva | 3 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 23 |
| Athen | -- |
| Malta | 22 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 20 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 25 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | --- |
| Buenos Aires | 22 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 993 hPa. við Ísland kemur móti Føroyum og brúgvalagið haðani verður við Føroyar mikudagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Føroyar fer eystureftir og dregur eitt skifti kaldari luft móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 4/10 kl. $06^{00}$– 5/11. $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,2°
Minsti hiti máldur í november: - -7,2° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 17/10 kl. $06^{00}$– 18/10 kl. $06^{00}$ Avfallið higartil í oktober: 0,0 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

3. november Mánin næstur jørðini
5. november Fullmáni
12. november Seinna kvarter
15. november Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. Nov. | 06.34 | 19.03 | 05.34 | 18.03 | 05.49 | 18.18 | 08.34 | 21.03 | 09.34 | 22.03 | 04.49 | 17.18 |
| 7. Nov. | 07.32 | 20.02 | 06.32 | 19.02 | 06.47 | 19.17 | 09.32 | 22.02 | 10.32 | 23.02 | 05.47 | 18.17 |
| 8. Nov. | 08.32 | 21.01 | 07.32 | 20.01 | 07.47 | 20.16 | 10.32 | 23.01 | 11.32 | - | 06.47 | 19.16 |
| 9. Nov. | 09.30 | 21.58 | 08.30 | 20.58 | 08.45 | 21.13 | 11.30 | 23.58 | 00.01 | 12.30 | 07.45 | 20.13 |
| 10. Nov. | 10.26 | 22.51 | 09.26 | 21.51 | 09.41 | 22.06 | - | 12.26 | 00.58 | 13.26 | 08.41 | 21.06 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. Nov. | 03.49 | 16.18 | 06.49 | 19.18 | 07.49 | 20.18 | 06.19 | 18.48 | 07.34 | 20.03 |
| 7. Nov. | 04.47 | 17.17 | 07.47 | 20.17 | 08.47 | 21.17 | 07.17 | 19.47 | 08.32 | 21.02 |
| 8. Nov. | 05.47 | 18.16 | 08.47 | 21.16 | 09.47 | 22.16 | 08.17 | 20.46 | 09.32 | 22.01 |
| 9. Nov. | 06.45 | 19.13 | 09.45 | 22.13 | 10.45 | 23.13 | 09.15 | 21.43 | 10.30 | 22.58 |
| 10. Nov. | 07.41 | 20.06 | 10.41 | 23.06 | 11.41 | - | 10.11 | 22.36 | 11.26 | 23.51 |

www.sosialurin.fo